Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Brúgvin um streymin 30 ár

**30. oktober vóru liðin 30 ár síðan brúgvin um Streymin, Sundalagsbrúgvin, varð latin upp fyri almennari ferðslu**

Atli Dam, sum var løgmaður, kvetti snórin, ið varð spentur tvørtur um brúnna. Arbeiðið við at gera brúnna byrjaði í mars 1971. Brúgvin er 220 metrar long og 9,5 metrar breið. Koyribreytin er 7 metrar breið og báðumegin er smøl gongubreyt, 1 metur breið. Mitt undir brúnni er siglingarrenna, ið er 25 metrar breið og klødd við bullverki. Siglingarhæddin er á kyrrindum 17 metrar. Byggifelagið E. Pihl & Søn, stóð fyri arbeiðinum at gera brúnna og Landsbyggifelagið hevði eftirlitið. Felagið Rambøll & Hannemann teknaði og projekteraði. Kostnaðurin varð umleið 13 milliónir krónur.

Teir sum hildu røður hendan dagin vóru: Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur, Petur Zachariasen, bygdaráðsformaður, úr Streymnesi, Jógvan Mørkøre, bygdaráðsformaður á Eiði, og Atli Dam, løgmaður.



*Myndin er tikin beint eftir at brúgvin varð latin upp fyri almennari ferðslu. Leggið til merkis at vegurin niðan til bergholið ikki er gjørdur. Á ovaru myndin sæst Atli Dam, løgmaður, klippa snórin. Á myndini síggjast eisini Jógvan Arge, útvarpsmaður, og Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður á Eiði*

*Kelda: Myndaárbókin Árið ið fór 1973*

# Harður bilsamanstoytur

**Um fimm tíðina seinasta sunnumorgun rendu hesir báðir bilarnir saman á horninum Sjúrðagøta / Varðagøta í Havn**

Hýruvognurin, ið kom oman eftir Varðagøtu varð ákoyrdur av Pizzabilinum, sum kom eftir Sjúrðargøtu, frá Sjónlekarahúsinum, og rendi inn í síðuna á hýruvogninum. Sum tað sæst á myndunum hevur stoyturin verið sera harður. Hýruvognurin, sum kom oman eftir, vendi niðan eftir, tá avtornaði. Hevði hann verið raktur beint inn á førarahurðina, hevði fólkaskaðin ivaleyst verið stórur. Fólkini í bilunum vórðu flutt á skaðastovuna, har hýruvognsførarin fekk nakrar pentir ísettar.

Beint áðrenn samanstoytin høvdu tveir mans staðið og bíða eftir einum øðrum hýruvogni á gongubreytini, har sum Pizzabilurin bleiv slongdur eftir at hava rent á hýruvognin. Tíbetur var tað farið at regna, so teir vóru farnir yvir um vegin at kroka.







NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Havnar Timburhandil 75 ár



*Starvsfólkini hjá P/F Havnar Timburhandli á Hálsi í Havn*

**Í dag, fríggjadagin 31. oktober, verður móttøka hjá Havnar Timburhandli á Hálsi í sambandi við at 75 ár eru liðin síðan fyritøkan var stovnað. Í ár eru eisini liðin 25 ár síðan fyritøkan flutti niðan á Háls**

Tað var H.C. Andreasen, nevndur Hans á Reyni, tók stig til at P/F Havnar Timburhandil bleiv stovnaður 8. august 1928.

Fimm tey fyrstu árini húsaðist felagið í leigaðum hølum, til tað sjálvt lat bygning byggja á leigaðum øki á Eystaru Bryggju í 1933. Bygningurin var samanlagt 400 fermetrar í tveimum hæddum og kostaði tá 6.000 krónur at byggja.

Virksemið øktist so við og við, sum tíðirnar nú einaferð loyvdi tí. Handilsøkið øktist og bygningarnir vóru útbygdir samsvarandi virkseminum.

Fyrst í 60-unum byrjaði ein rættulig kapping um at ogna sær partabrøv í felagnum. Hetta kom serliga av at Eivind Fosaa, sum hevði lært og starvast hjá felagnum síðan 1936, og hevði vunnið seg upp til at vera eitt av ábyrgdarfólkunum í felagnum, hevði sett sær fyri at fáa ávirkan á felagið ígjøgnum ein størri eigarapart. Hann var sannførdur um, at felagið hevði vakstrarmøguleikar, sum ikki vóru brúktir. Í 1973 avgjørdi Eivind Fosaa sjálvur at taka við leiðsluni í felagnum.

Í januar 1978 læt Timburhandilin upp amboðsdeildina á Hálsi, og 1. apríl sama ár var alt virksemið flutt niðan av keiini. Felagið húsaðist tá í bygningi uppá 3.600 fermetrar samanlagt, umfamt 8.500 fermetra uttanduraøki

Í 1977 lat P/F Havnar Timburhandil upp deild á Sandi.

Virksemið øktist munandi upp í gjøgnum 80-ini, og í 1987 varð neyðugt við enn meira plássi í Havnini og lat felagið byggja enn ein bygning uppá 3000 fermetrar fyri at nøkta tørvinum, ið var.

Men hóast hetta, skuldu tó ganga nøkur ár enn, áðrenn felagið kundi húsast í báðum bygningunum samstundis.

19. desember 1987 hendi ein verulig vanlukka fyri felagið, tá tann eldri av bygningunum og so at siga øll vørugoymslan fórst í støsta eldsbruna í Føroyum nakrantíð. So at siga alt var burtur, ið hevði nakað virði.

Hóast hesa vanlukku, sum flest øll væntaðu fór at seta eitt punktum fyri virkseminum hjá felagnum - í øllum førum sum timburhandli - varð avgjørt at bróta upp um armar og fáa fyritøkuna uppá beinini aftur. Og longu í apríl mánað árið eftir var nýggjur handil í tí bygninginum, sum stóð í ger tá eldsbrunin var.

P/F Havnar Timburhandil keypti í 1989 P/F Snikkaravirkið á Kambsdali. Felagið er í dag ein deild av P/F Havnar Timburhandli.

Í 1991 var flutt inn aftur í bygningin, sum brendi í desember 1987.

Búskaparkreppan fyrst í 90-unum rakti byggivinnuna ógvuliga meint og virksemið hjá Havnar Timburhandli minkaði við 70 prosentum í mun til 1988, og starvsfólkatalið kom heilt niðri á 18 í móti 57, tá tey vóru flest.

Grundað á at virksemið innan byggivinnuna var sera lítið, varð í 1994 avgjørt at keypa allar ognirnar hjá P/F Tórplast í Vestmanna og nýtt felag, P/F Vest Pack, varð stovnað.

Sama árið varð móðurfelagið P/F H.T.Holding, sett á stovn, felagið hevur fíggjarligt virksemið sum endamál, herundir at eiga og reka P/F Havnar Timburhandil og tess dóttirfeløg.

Í 1995, tá P/F SMS var farið í gjaldsteðg, setti P/F Havnar Timburhandil helvtina av tí peningi, ið skuldi til at fáa felagið á føtur aftur, í hetta felag. Hesin ognarpartur var varðveittur til 1997, tá avgjørt varð at selja partabrøvini í P/F SMS.

P/F Havnar Timburhandil var somuleiðis við til at seta á stovn aftur flakavinnuna á Sandoynni, og var partaeigari í P/F Sandoy Seafood eitt tíðarskeið. Samstundis setti P/F Havnar Timburhandil á stovn felagið P/F Industry Supply Ltd., ið skuldi taka sær av sølu av pakkitilfari, saman við P/F Vest Pack.. Virksemið varð lagt saman við virkseminum hjá P/F Vest Pack, og í 2001 bleiv felagið tikið av aftur.

Samlaða víddin á handils- og framleiðsluhølunum hjá P/F Havnar Timburhandli - allar deildir og dótturfeløg íroknað - er nú uml.10.000 fermetrar innandura, umframt uml. 20.000 fermetrar uttandura øki. Í øllum deildum og dóttirfeløgum eru í dag umleið 70 starvsfólk. Stjórar í P/F Havnar Timburhandli eru Heini Fosaa og Jógvan Jørgensen.

Í sambandi við 75 ára føðingardagin verður móttøka á Hálsi í dag frá 15-17.

## John Nielsen 60 ár



Týsdagin 28. oktober fylti John Nielsen í Nuuk 60 ár. John er føddur í Vági í 1943 og kom til Havnar í 1955. Hann er útbúgvin sum málari. Í 1965 koyrdi hann vøruvogn á bilstøðini Taxa og árið eftir fór hann at koyra hýruvogn í Akstur Bil. Fyrst í 70-unum koyrdi hann í Auto í eini tvey ár, síðani í Havnar Taxi og seinni á bilstøðini Bil. Í 1979 flutti John til Grønlands at búgva, har hann m.a. hevur arbeitt sum málari.

## Malla Lið Hansen 50 ár.



Leygardagin tann 1. november verður Malla Lið Hansen Miðvági 50 ár.

Malla er fødd í Sørvági, hon er dóttir Tóru og Jógvan Lið. Sum ung genta misti hon mammuna, so hon mátti hjálpa pápanum við at halda hús.

Malla er gift til Miðvágs og eigur 4 børn, Tove, Sonny, Irdi og Kjartan, eisini eigur hon fleiri ommubørn. Hon er sera familjukær og er ikki bert mamma og omma, men eisini besti vinur við síni børn og ommubørn.

Malla hevur verið heimahjálp í mong ár og er sera vældámd av teimum gomlu.

## Dagurin

**31. oktober. Upphav trúbótar Luthers.** Eftir trúbótina koma, sum vera man, eingi nýggj halgimenni upp í álmanakkarnar, men luthersku álmanakkarnir varðveita tey gomlu nøvnini og taka eisini við tey nýggju katólsku nøvnini. So verða eisini ymiskar søguligar hendingar nevndar, m.a. dagurin 31. oktober, sum verður hildin til minnis um, at Martin Luther setti sínar 95 setningar upp á slotskirkjudyrnar í Wittenberg.